Gjøgnumbrot í oljuleiting:

# Slóðbrótandi avtala um at bora á basaltinum

**Leiting eftir kolvetnum í føroyskum øki hevur í dag tikið eitt týdningarmikið stig víðari í strembanini at finna kolvetni í rakstrarverdum nøgdum sigur Oljufyrisitingin, nú avtala er gjørd um at bora inni á basaltinum**




*Kortið vísir loyvisøkini frá 1. útbjóðing á landgrunninum tvs. bæði 6 og 9 ára loyvi. Nú verða so tveir brunnar fluttir frá øki 004 og lagdir saman at bora í øki 007. Pílurin vísir staðið, har borurin verður settur í um hálvtannað ár.*

*Kort Oljufyrisitingin*

TÍÐINDASKRIV

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, og loyvishavararnir í loyvi 004 og loyvi 007, hava í dag gjørt avtalu um, at feløgini í seinasta lagi í 2007 fara at bora ein leitibrunn á loyvi 007.

Oljufeløgini BP Amoco Exploration (Faroes) Limited ("BP") og Shell U.K. Limited ("Shell") vendu sær fyrr í ár til føroysku oljumyndugleikarnar at kanna møguleikarnar fyri at eftirverandi skyldurnar at bora tveir leitibrunnarnir í loyvi 004, kundu lúkast við at bora ein brunn longur inni á landgrunninum, har tjúkt lag er av basalti.

Feløgini meta, at tey úrslit, tey hava fingið frá boringini, ið gjørd varð í 2001, á Svínoy leitimiðinum í loyvi 004 og tær kanningarnar, ið síðani eru gjørdar, talaðu fyri, at tað eru betri møguleikar at finna kolvetni í rakstrarverdum nøgdum á øðrum økjum, enn í økinum fyri leitiloyvi 004. Hesum eru føroysku oljumyndugleikarnir samdir í, og fegnast tí um at leitingin nú veruliga tekur dik á seg á basaltøkinum. Samstundis má ásannast, at avgerðin um at veita 9 ára loyvini sum part av fyrsta loyvisumfar, nú hevur ein avgerandi leiklut fyri at avtalan í dag kundi gerast veruleiki.

BP og Shell hava gjørt semju við Anadarko Faroes Company ("Anadarko"), ið er einasti loyvishavari á loyvi 007, um at bora ein leitibrunn á hesum økinum. BP og Shell gerast partar av loyvi 007, og verður BP fyristøðufelag í loyvinum. Samstundis sleppa BP og Shell loyvi 004.

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, er væl nøgdur við hesa nýggju gongd í arbeiðinum at finna kolvetni í rakstrarverdum nøgdum á føroyskum øki. Bjarni Djurholm sigur:

"Oljuleiting í Føroyum hevur nú góð 4 ár á baki síðan fyrsti borurin varð settur í. Royndirnar higartil hava víst, at kolvetni finnst á føroyskum øki og síggja vit nú at leitingin flytur seg longur inn á landgrunnin at kanna leitimið undir basaltinum. Tann brunnurin, sum í dag er avtalaður, hevur fyrst og fremst til endamáls at leita eftir kolvetnum, men eisini at staðfesta jarðfrøðiligu viðurskiftini undir basaltinum til frama fyri framhaldandi leitivirksemi."

"Vit hava eisini staðfest, at føroyskar fyritøkur, ið hava fingið møguleikan at veita oljuvinnuni tænastur í samband við leitivirksemi, til fulnar hava prógvað, at tær eru førar fyri at átaka sær uppgávurnar."

"Tað er tí mín vón at feløgini, sum nú taka stig til at bora gjøgnum basaltið, hepnast við hesi stóru avbjóðing til gagns fyri samfelagið alt."



*Eftir undirskrivingina av avtaluni: Mike Smith frá Shell, John A. Edge frá Anadarko, Sigurð í Jákupsstovu, stjóri á Oljufyristingini, Bjarni Djurholm, landsstýrismaður og Graham R. Day frá BP*

*Mynd Jan Müller*

# Bæði BP og Anadarko fegnast um brunnavtalu



*Umboð fyri oljufeløgini skrivað undir nýggju avtaluna*

*Mynd Jan Müller*

**Oddamenninir fyri tey bæði oljufeløgini BP og Anadarko fegnast um avtaluna, sum loksins er undirskrivað um at flyta tveir brunnar frá landssynningshorninum á landgrunninum longur inn á landgrunnin og har bora ein rættiliga kostnaðarmiklan brunn gjøgnum basalt, nakað, sum ikki er roynt her áður. Shell er eisini partur av nýggja samtakinum**

OLJULEITING
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Týsdagurin tann 11. oktober kann koma at gerast ein minniligur dagur í føroyskari oljusøgu. Henda dag varð ein heldur óvanlig avtala gjørd millum føroyskar myndugleikar og trý stór altjóða oljufeløg. Bretska BP og hálendska Shell, sum hava bundið seg til at bora tveir brunnar aftrat á landgrunninum, skrivaðu henda dag undir avtalu við amerikanska oljufelagið Anadarko um at flyta hesar báðar brunnarnar frá teirra 6 ára loyvi nær markinum til 9 ára loyvið hjá Ana darko, sum liggur longur inni á landgrunninum – og leggja teir saman til ein brunn, ið skal broast gjøgnum basalt.

Orsøkin til at flyta umrøddu brunnar er at finna meira hóskandi støð at bora eftir olju og gassi á Føroyaleiðini, nú fýra brunnar í landssynningshorninum av landgrunninum stutt frá bretska markinum, ikki góvu tey úrslit man annars hevði vónað. BP, sum er fyristøðufelag, hevur gjørt vart við, at tað ikki metir egnað støð vera at bora eftir olju í hesum økinum. Út frá tí sannroynd er so sprottið hugskotið um at flyta brunnarnar longur inn á landgrunnin.

Nú er so gjørd ein áhugaverd avtala, sum føroyskir myndugleikar fegnast um, tí hon setir gongd á aftur oljuleitingina og tað áhugaverda er, at hetta verður í einum nýggjum øki, har eingin hevur borað áður, nevniliga inni á basaltinum.

Føroyskir myndugleikar hava annars leingi sæð fram til, at okkurt oljufelag fór at bora gjøgnum basaltið, soleiðis at vitan fekst um løgini undir basaltinum. Henda avtalan er so tann fyrsta av sínum slag. Og kann man siga, at hon er rættiliga kolveltandi. Ein annar møguleiki kundi verið, at BP/Shell gjørdu av als ikki at bora og heldur rindaðu føroyska landsstig víðari.

– Bæði vit í Anadarko og eisini BP og Shell eru sera bjartskygd um henda brunnin og rokna vit við at bora hann í seinasta lagi 2007. Anadarko, sum hevur eitt 9 ára loyvi, skuldi av røttum gera av, um tað vildi



*Johan Mortensen, umboðsmaður fyri Anadarko í Føroyum her saman við Steve Linnard frá Anadarko og Graham Day frá BP*

*Mynd Jan Müller*



*Sigurð í Jákupsstovu tekur ímóti føroyska umboðsmanninum hjá BP, Hjarnar Djurhuus*

*Mynd Jan Müller*

kassanum tað virði, sum tveir brunnar hava, eina staðni millum 300 og 500 mió. kr. Tað hevði verið sera óheppið fyri víðari leitingina, tí tá misti tú møguleikan at bora fleiri brunnar.

John A. Edge, altjóða samráðingarleiðari hjá Anadarko kom úr Houston til Føroya fyri at seta navn sítt undir hesa avtalu. Hann er sera fegin um avtaluna, tí hon gevur ætlanunum hjá felagnum kjøt og blóð. Felagið hevur annars í mong ár gjørt ymsar kanningar á sínum loyvi á landgrunninum uttan tó at gera endaliga greitt, hvat tað ætlaði at gera her í framtíðini. Nú kemur so avtalan við BP og Shell sum eitt kærkomið høvið at koma eitt týðandi halda fram við sínum virksemi í Føroyum um hetta mundið. Nú komu so BP og Shell og bóðu um loyvi at bora teirra brunn inni á loyvinum hjá Anadarko, og harvið verður felagið eisini beinleiðis partur av einum brunni. John Edge dylur ikki fyri, at teir eru sera fegnir um at skula samstarva við BP og Shell, tí hetta eru feløg á høgum tøkniligum støði, og tí kemur tað væl við hjá Anadarko at koma í samstarv við tey.

Men ikki nóg mikið við tí. Anadarko er tí teirri heldur løgnu støðu, at felagið, sum jú enn ikki hevði bundið seg til at bora nakran brunn, nú bráddliga verður partur av tveimum brunnum. Felagið er nevniliga eisini medeigari av einum øðrum 9 ára loyvi, sum Statoil er fyristøðufelag fyri. John Edge sigur, at samráðingarnar eru ikki lidnar um at flyta tveir aðrar brunnar úr landssynningshorninum til hetta 9 ára loyvið, ið liggur uppaftur longur inni á landgrunninum, men hann roknar við, at tær enda við, at ein brunnur verður boraður har í komandi ári. Tað eru oljufeløgini Statoil og Amerada Hess og teirra samstarvspartnarar, ið á sama hátt sum BP og Shell eisini ynskja at flyta síni tvey boriforpliktilsi frá tí sonevnda "Gullhonrinum" til eitt 9 ára loyvi longur inni á landgrunninum.

– Vit fegnast sjálvandi um at vera komnir í hesa støðu og tað undirbyggir so eisini á okkara stóra arbeiði seinastu árini at skilja undirgrundina betur á, her serstakliga økini við basalti. Vit eru sera spentir um framtíðina og vóna at vera eitt av oljufeløgunum, sum fara at havt fast fótafesti á føroyska landgrunninum í mong mong ár.

Eisini umboðið fyri BP, Graham R. Day, sum var við til at undirskriva brunnavtaluna á Oljufyristingini týsdagin, er fegin um, at tað eftir drúgvar samráðingar og kanningar loksins hevur eydnast at koma so langt. – Eg vil takka øllum, sum hava verið við til at gera hetta møguligt, okkara partnarar og føroysku oljumyndugleikarnar. Vit fara nú at gera okkara heimaarbeiði til fulnar, soleiðis at talan verður um eina trygga verkætlan, har allir partar skulu kenna seg tryggar við arbeiðið.

## William Heinesen leggur navn til komandi oljukeldu

OLJULEITING
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Tá farið verður at leita eftir olju og gassi er siðvenja, at oljufeløg seta nøvn á síni prospektir tvs. støð í undirgrundini, har møguleikar eru at finna olju og somuleiðis veruligar olju/gass keldur. Noreg byrjaði við at nýta norrønu gudalæruna við nøvnum sum Gullfax, Snøvit, Ormen Lange, Troll osfr. Bretar hava nýtt fjallanøvn sum Schiehallion og Foinaven, fuglanøvn sum Cormorant og Bitten og hava so eisini brúkt teirra vælkenda høvund Walter Scott í oljunavnahøpi.

Í Føroyum hava oljufeløgini higartil nýtt nøvn sum Marjun, Svínoy og Brugdan, tvs. persónsnøvn, oyggjanøvn og fiskanøvn.

Í sambandi við at avtala týsdagin varð gjørd millum tey trý oljufeløgini BP, Shell og Anadarko og føroyskar myndugleikar um at bora ein brunn inn á landgrunninum í 2007, hava somu feløg eisini samtykt, at ein møgulig olju- ella gasskelda, sum verður funnin undir basaltinum, skal kallast upp eftir mæta føroyska mentamanninum William Heinesen, sála. Eisini verður her hugsað um mæta jarðfrøðingin William Smith.

Sum skilst er hetta er eisini eitt signal um, at vinnan og mentanin kunnu hava stórt virði av at samstarva.